





# Fimm kór á seks konsertum

**Komandi vikuna verða ikki minni enn seks klassiskar konsertir við fimm kórum. Í kvøld hava Tarira og estlendska kórið The Orthodox Singers konsert í Vesturkirkjuni**

Í kvøld klokkan 19.30 verður ein sera forvitnislig konsert í Vesturkirkjuni í Havn har føroyska kórið Tarira og estiska kórið Orthodox Singers fara at framføra verk saman og hvør sær.

Konsertskráin er eitt fjølbroytt bland av kórtónleiki úr Ruslandi, Estlandi, Grikkalandi, Serbien og Onglandi, sum hvørt kórið sær fer at framføra.

Men fyri at samstarvið skal fevna um meira enn eina felags konsert, har kórini bert syngja sína egnu skrá, so hava tey gjørt av at syngja tvey verk saman; eitt verk eftir Sunleif Rasmussen og eitt verk eftir Sergei Rachmaninov. Konsertin við Tarira og estiska kórið er ókeypis.

Hósdagin byrjar Syngjandi Harkaliðið – Det Syngende Selskab - við millum øðrum føroyska tenorinum, Ernst Sondum Dalsgarð Føroya ferð, sum endar við konsert í Norðurlandahúsinum sunnukvøldi.

Umframt Ernst Sondum Dalsgarð eru Merete Sveistrup, sopran og Pia Schnack, mezzosopran. Vagn Sørensen leikar undir hjá teimum á klaver. Tey framføra verk úr operum, operettum og musicals.

Ernst kenna vit væl her heima frá millum annað Nýggjárskonsertini og øðrum solistuppgávum. Merete Sveistrup og Pia Schnack eru báðar nógv í umbúna innan teirra fak og hava tær báðar havt týdningarmiklar leiklutir á ymsu operapallunum í Norðanlondum.

Tey fara at hava tríggjar konsertir: Hósdagin 27. mars kl. 19.30 í Mentunarhúsinum í Fuglafirði, fríggjadagin 28. mars kl. 20.00 í Ósaskúlanum í Klaksvík og sunnudagin kl. 16.00 í Norðurlandahúsinum.

Á konsertini í Klaksvík luttekur eisini kvinnukórið Suð, við Steinvør Fonn sum leiðara.

Og týsdagin, 1. Apríl, koma heimskendir írskir tenorar at vitja. The Twelve Irish Tenors til Føroyar hava ferðast kring allan knøttin í gott og væl tvey ár og hava vakt stóran ans við einari langari røð av framúrskarandi konsertum.

Saman við orkestri leiða tenorarnir okkum víða í tónleikaheiminum. Framførslurnar fevna um alt frá klassiskum tónleiki, til popp, rock og fólkatónleik. Á virðisløntu framførsluni syngja tenornarnir fleiri av allarbestu sangunum úr 20. øld.

Báðar konsertirnar hjá írsku tenorunum eru longu útseldar.

